## Frem vann aftur

Danska 1. deildarfelagið Frem hevur fingið strúkandi byrjan upp á kappingina í ár. Liðið, sum í vetur misti nógvar spælarar, spældi í gjárkvøldið næsta dystin í ár, og aftur hesaferð vann felagið, har tríggir føroyskir spælarar eru við í hópinum. Jónas Tór Næss hevur fast pláss á liðnum, og hann var við allan dystin ímóti Skjold í gjárkvøldið. Frem vann dystin 2-0. Atli Gregersen og Gunnar Nielsen vóru ikki við í dystinum.

## Eingin súkkling á Oyggjaleikum á Álandi

Fyrireikararnir av Oyggjaleikunum á Álandi hava nú boðað frá, hvørjar ítróttargreinar verða við á leikunum í 2009. Fimleikurin og badminton vóru send út av leikunum á Rhodos næsta ár, men tey koma innaftur í hitan í Álandi. Hinvegin rýkur súkklingin úr í 2009. Ítrótargreinarnar til Oyggjaleikirnar í 2009 verða hesar: Badminton, bogaskjóting, borðtennis, fimleikur, flogbóltur, fótbóltur, frælsur ítróttur, golf, judo, kurvabóltur, skjóting, sigling/windsurfing, svimjing og tennis.



# Ingi gevst í Birmingham

**Ingi Højsted gevst at spæla fótbólt í enska Premier League felagnum Birmingham. Ingi leitar nú eftir nýggjum felag, og fleiri feløg sýna honum áhuga**

FÓTBÓLTUR
*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

Í morgun boðaði enska felagið Birmingham City frá, at føroyski spælarin Ingi Højsted gevst í felagnum. Partarnir høvdu ein mánað eftir av sáttmálanum teirra millum, men semja er um at gevast við samstarvinum beinanvegin.

– Ingi er tilvitaður um, hvat hann vil við fótbóltinum, og hann vil sleppa at spæla dystir. Hann hevur ikki av álvara fingið kjansin í Birmingham, og tí vildi hann sjálvur sleppa úr sáttmálanum, so hann kann koma víðari, sigur Jákup í Stórustovu, umboðsmaður. 20 ára gamli Ingi Højsted fór til Onglands at spæla fótbólt seint í fjør, og frá árskiftinum var hann alment Birmingham-spælari. Sáttmálin við enska stórfelagið var galdandi í fimm mánaði í fyrstu atløgu, men nú eru seinastu vikurnar av avtaluni annuleraðar.



*Ingi Højsted gevst at spæla fyri enska stórfelagið Birmingham, men avgerð er ikki tikin um, hvar Ingi nú fer at royna seg*

**Ikki vist at hann kemur heim**

Ingi fekk ongantíð av álvara fótin fyri seg í Birmingham. Hann var skaddur fyrstu tíðina, spældi síðani við eykaliðnum, gjørdist aftur skaddur, og seinastu vikurnar er hann als ikki sloppin fram at á eykaliðnum, hóast hann hevur verið klárur at spæla. Samanlagt spældi hann ein hálvleik við eykaliðnum hjá Birmingham.

– Ingi vildi sleppa úr Birmingham, tí hann vil meira við fótbóltinum enn bara at sita á beinkinum. Tí hava vit gjørt eina avtalu við felagið um at gevast við samstarvinum beinanvegin, og nú tosa vit við onnur feløg um møguligt samstarv, sigur Jákup í Stórustovu.

Kemur Ingi heim til Føroya at spæla nú?

– Fleiri feløg hava sýnt honum áhuga, og møguleikar eru bæði í Føroyum og uttanlands. Men eingin avgerð er tikin um hetta enn. Tað ganga nakrir dagar, áðrenn avgerðin verður tikin.

Kemur Ingi Højsted heim til Føroya at spæla, er tað ikki ósannlíkt, at hann endar aftur í B36, har hann var stuðulsspælari á liðnum, sum vann FM í fjør.

## Føroysk landslið til NM

Leygardagin 8. og sunnudagin 9. apríl verður Norðurlandameistarakapping í amboðsfimleiki, í Kópavogi, beint uttanfyri Reykjavík. Leygardagin verða liðkappingarnar, samstundis sum bestu fimleikararnir á øllum amboðum samanlagt verða kosnir. Kapping leygardagin er eisini kvalifikatiónskapping til amboðsfinalurnar, sum verða sunnudagin.

Úr Føroyum luttaka 7 fimleikarar tilsamans, 4 kvinnur og 3 mans. Á føroyska kvinnulandsliðnum eru: Anita Knudsen og Monika W. Poulsen, báðar úr Støkk, og Brim H. Hoydal og Elinborg T. Durhuus, báðar úr Ljósinum. Á manslandsliðnum eru teir: Høgni R. Øster, Rósing Dam og Øssur D. Eiriksfoss, allir tríggir úr Havnar Fimleikafelag.

Støði á hesi kapping er væl hægri enn á t.d. Oyggjaleikum. Tí vantar Fimleikasambandið ongi heiðursmerki til Føroyar hesuferð. Fyri føroysku fimleikararnir er luttøkan í hesi kapping fyrst og fremst ein partur av eini langtíðarætlan, sum hevur til endamáls at hækka støði á føroyskum amboðsfimleiki. Ætlanin er, at hetta skal geva rættulig úrslit til komandi Island Game Gymnastics, sum verða summarið 2007 í Føroyum.




GITIÐ LEIKARAN



**Kappingarreglur**

Frá mánadegnum 3. apríl og í 15 fylgjandi Sosialum verður andliti á einum kendum føroyskum fótbóltsspælara at síggja. Myndin er tó viðgjørd nakað, soleiðis at tað verður truplari at vita, hvør spælarin er.

Á síðu 31 í fótbóltsblaðnum, sum var partur av VikuskiftisSosialinum, eru 15 tómar reglur. Á hesar skulu nøvnini á teimum 15 spælarunum setast.

Tá hetta er gjørt, skal blaðsíðan við nøvnunum sendast okkum. Seinasta freist fyri innlatan er mánadagin 1. mai. Navnið á vinnaranum verður kunngjørt í Sosialinum tann 4. mai.

Minnist til at skriva navn, bústað og telefonnummar á seðilin, sum verður sendir okkum.

Verður avrit av síðuni sent okkum, verður hetta ikki roknað sum gyldugt luttøkuprógv.

Vinnið fótbóltsupplivingina Skotland - Føroyar

ATLANTIC AIRWAYS